VIÐMERKINGAR

# Tíðin er komin at skipa samstarv

**Jón Guttesen**
*Tvøroyri*

*Suðuroyingar fara til val við tí vón at komandi bý- og bygdaráðini venda kegli og klandri baki. Men vón skal gerast veruleiki. Tíðin er komin at vit skipa okkum við samstarvi fyri eyga.*

Skjøtil skal setast á at skipa samstarv. Tá komandi bý- og bygdaráð fara at skipa seg í nevndir skal hetta gerast við samstarvi fyri eyga.

Heldur enn at skipa sjey meinlíkar nevndir ið varða av sama øki, skal ein nevnd skipast sum fevnur um alla oynna, við umboðum úr teimum sjey bý- og bygdaráðunum.

**Umboðsmannabýtið**
Umboðsmannabýtið skal gerast so, at øll bý- og bygdaráð verða nøktandi umboðað, samstundis sum eingi verða umboðað við yvirvág.

Trinnir møðuleikar eru: fyrsti er ein 11-mannað nevnd við trimum umboðum úr báðum býráðunum og einum umboði úr teimum fimm bygdaráðunum. Næsti er ein 9-manna nevnd við tveimum umboðum úr báðum býráðunum og einum umboðið úr bygdaráðunum. Og síðsti er ein 7-mannað nevnd har øll plássini verða javnt umboðað.

**Fíggjarorka**
Íløgur og kostnaður av umsiting skal býtast javnt millum bý- og bygdaráðini. Hetta gerst við einum býtislykli samsvarandi fólkatalið.

Fólkatølini frá august í ár geva henda býtislykil: Fámjin og Hov 2%, Porkeri og Sumba 7% og 8%, Hvalba 15%, Vágur 28% og Tvøroyri 36%.

Umsiting skal fáast til vega við at fólk í umsitingini á einum av plássunum verður parttíð knýtt at nevndini.

Viðkomandi bý- og bygdaráð fær síðan endurgjald frá nevndini fyri veitta tænastu.

**Uppgávur og heimildir**
Uppgávurnar hjá einari nevnd í hevur alla oynna sum virkisøki er tann sama sum nevndirnar á teimum einstøku plássunum. Nevniliga at leggja fíggjarætlan, at raðfesta og umsita íløgur og at seta í verk lógir og kunngerðir frá landsmyndugleikunum.

Somuleiðis eru heimildirnar á leið tær somu sum hjá nevndunum vit kenna í dag. Avgerðir verða tiknar í bý- og bygdaráðunum eftir áheitan frá nevndunum, men áheitanin skal koma úr nevndunum.

Á henda hátt verður sjálvsavgerðarrætturin verandi í teimum ymsu bý- og bygdráðunum.

**Karmarnir**
Neyvan verður tørvur á fleiri enn einum nevndarfundi um mánaðin, og fundir kunnu skifta millum plássini um semja ikki fæst um eitt pláss.

Reglur um viðtøkuføri, formanni, og so frameftir verða á leið teir somu sum vit kenna teir í dag.

**Málssøki**
Umhvørvisøki er lágt raðfest á øllum plássum í oynni og umsitingarliga orkan, ið verður nýtt til øki, er somuleiðis lítil. Ilt er at fáa eyga á tiltøk ið skulu verna og fjálga um umhvørvið og minkað um dálking.

Somuleiðis er øki so snikkað, at tiltøk muna best um tey fevnað um alla oynna.

Tí er tað sjálvsagt at umhvørvisnevnd verður skipa sum fevnir um alla oynna.

Tær uppgávur sum í dag liggja í umhvørvisnevndum og sum ikki fæst semja um at samskipa, skulu flytast í tær einstøku teknisku nevndinar, og harvið verða verandi á plássunum.

Einki býráð megnar at lyfta eldraøki einsamalt, og tá eldraøki verður lagt út til tey ymsu økini at fíggja, verður neyðu-gt við alsamt tættari samstarvi. Tí er tað sjálvsagt at øki verður samskipa eftir sama frymli.

Barnaverndin verður vantandi skipa soleiðis í næstum.

Onnur øki ið høvdu gagn av skipaðum samstarvi eru tilbúgving, brunanevnd, komunulæknaskipan, havnir, vinnuframi, og nógv fleir aftrat.

Sitandi bý- og bygdaráðini siga seg øll verða fyri tættari samstarvi, um tey ikki eru fyri samanlegging.

Komandi bý- og bygdaráðini skulu at gera bart og fáa samstarvið í fasta legu frá fyrsta degi.

# Snapsur, øl & rækjur

**Johan Mortensen**
*Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum til býráðsvalið*



Vit-modernaðu-altjóðagjørd- Havnarfólk-kunnu-ikki-halda-áfram-við-okkara-gakk-gakk-dupult-morali. Um man vil ella ikki, so innflyta vit umleið 400.000 litrar av rúsdrekka árliga. Av hesum eru slakir 300.000 litrar av vodka og snapsi sum vit uttan trupulleikar kunna framleiða sjálvi.

Komandi Tórshavnar Býráð skal fáa Vinnumálaráðið at dagføra okkara avoldaðu Rúsdrekkalóg soleiðis at Jógvan Dahl og Finnur Lutzen og aðrar eldsálir sleppa í gongd í Tórshavn við framleiðslu av rúsdrekka. Í hesi vinnuni fara at verða nýggj arbeiðspláss sum vilja bøta um handilsjavnan og vit fáa eitt Tórshavns Vodka sum ferðafólk ABSOLUT fara at keypa.

Tá Havnin fær broytta Rúsdrekkalóg skal sjálvandi verða loyvt at selja øl til allar fótbóltsdystir og rockonsertir og vertshús hava loyvi at servera uttanfyri. Á bryggjuøkinum skal Býráðið gera ein altjóða Duty Free handil sum vil gleða bæði føroyingar og útlendsk ferðafólk. SMS skal fáa tað skonkiloyvi sum teir áravís hava roynt at fingið.

Føroyskur snapsur og føroyskt øl hóska væl til rækjir, men skjótt verða ongar rækjur eftir hjá okkum at skola niður um vit ikki stuðla hesari vinnu eitt sindur. Vit sum eru liberal og progressivt hugsandi Tjóðveldisfólk vilja at rækjuskipini fáa ein ávísan og avmarkaðan stuðul. Vit eru um at missa alingina og vit hava ikki ráð til eisini at lata rækjurnar fara.

# Brennistøðin aftur borgaravinarlig

**Leivur Hansen**
*býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Borgararnir í Tórshavnar kommunu sleppa nú aftur ókeypis av við privatburturkast vanligar yrkadagar - og ikki bara leygardagar.

Hetta samtykti heilsu- og umhvørvisnevndin hjá býráðnum á snarfundi mánadagin.

Harvið ásannaði nevndin, at hon var lopin framav við góðkenning síni av nýggju gjaldsviðtøkunum fyri móttøku av burturkasti, sum komu í gildi 1. september.

Sambært viðtøkunum kundu borgararnir ikki longur ókeypis lata inn privatburturkast vanligar yrkadagar, men einans leygardagar.

Hetta fekk meg í einum lesarabrævi herfyri at kalla avgerðina fyri eitt stórt grønt afturstig fyri kommununa.

M.a. stúrdi eg fyri stórum bíðirøðum uttanfyri brennistøðina leygardagar, sum kundu freista fólk til at velja ein lættari og ómaksleysari hátt at beina fyri burturkastinum - til ampa fyri náttúru og umhvørvi okkara.

Kúvendingin nú hjá bæði leiðslu og nevnd vísir, at grund var fyri hesi stúran.

Á fundinum í heilsu- og umhvørvisnevndini varð staðfest, at tað hevur verið ein stórur vansi, at privatfólk ikki hava kunnað gjørt nýtslu av plássinum vanligar dagar.

Hetta hevur gjørt, at trýstið leygardagar hevur verið somikið stórt, at ferðslan ikki hevur gingið væl, og tí hava viðskiftafólk heldur ikki fingið gagnnýtt skipanina nóg væl.

Við hesum staðfestingum í huga hevur heilsu- og umhvørvisnevndin so nú samtykt at broyta gjaldsviðtøkurnar soleiðis, at borgararnir nú aftur - frá mánadegi til leygardag - ókeypis kunnu lata inn privat burturkast, ið er fevnt av galdandi reglugerð um húsarhaldsburturkast.

Kommunala brennistøðin er sostatt aftur vorðin borgaravinarlig.

Takk fyri tað.

# Svar til Malenu Arnholdsdóttir

**Jógvan á Lakjuni**
*landsstýrismaður*



Eg havi fingið ein fyrispurning frá Malenu Arnholdsdóttir, formanni í Javna, viðvíkjandi frítíðarundirvísingini í Havn. Malena spyr, um tey menningartarnaðu og tey við skerdum førleika eru gíslar í sambandi við sparingar á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla.

Eg eri glaður fyri spurningin - og ikki minst fyri greinarnar hjá Malenu Arnholdsdóttir og Sigrun Wardum, sum báðar hava gjøgnumskoðað, at málið ikki er so einfalt, sum leiðarin í kvøldskúlanum í Havn og aðrir saman við honum hava lýst tað.

Løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v.m. er ein stuðulslóg, og tað eru tær einstøku kommunurnar, sum seta frítíðarundirvísing á stovn í einum vavi, ið er hóskandi eftir viðurskiftunum í kommununi. Sostatt er tað bara leiðarin fyri frítíðarundirvísingini í Tórshavnar Kommunu, ið hevur gjørt av at skerja tilboðini til fólk við breki í skúlaárinum 2004/05, og ikki landsstýrismaðurin í mentamálum ella samgongan.

Tað eru kommunurnar sjálvar, sum bera allar útreiðslurnar av frítíðarundirvísingini, men tær fáa stuðul frá landinum til góðkent virksemi, sum er studningsheimilað, 50% til almenna frítíðarundirvísing, 100% til serstaka frítíðarundirvísing og í mesta lagi 50% til frítíðarvirksemi.

Tær einstøku kommunurnar avgera sjálvar, hvussu tær prioritera sítt virksemi, men Mentamálaráðið hevur mælt til, at umleið 75% av studningsjáttanini verður brúkt til almenna frítíðarundirvísing, harav í minsta lagi 10% til frítíðarvirksemi, meðan umleið 25% verða brúkt til serstaka frítíðarundirvísing. Eisini hevur Mentamálaráðið víst á, at um tørvur er á at nýta størri part av studninginum til serstaka frítíðarundirvísing, kann hon verða skipað sum almenn frítíðarundirvísing eftir galdandi reglum.

Tilmælið um, hvussu kommunan nýtir studningin, er tað sama í ár sum í fjør, so her eru ongar broytingar gjørdar í raðfestingini av studninginum til almenna frítíðarundirvísing, frítíðarvirksemi og serstaka frítíðarundirvísing.

Tað er rætt, at neyðugt hevur verið at lækkað játtanina í 2004 nakað, men í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2005 er játtanin ikki skerd.

Men tað er kommunan sjálv, ið velur, hvørji tilboð hon bjóðar sínum borgarum. At tey brekaðu fyrst verða vald frá, er harmiligt.

So svar mítt til Malenu Arnholdsdóttir má vera, at tað er ikki heilt frítt, at tey menningartarnaðu her verða brúkt sum gíslar - ella sum amboð til at trýsta myndugleikarnar við!



# Kunnu klaksvíkingar ikki biðja Jógvan við Keldu koma norður aftur?

TING-HELLAN

TINGHELLUDEBATTIN
*Jóanes Nielsen*



Tey seinastu tjúgu árini hevur man við jøvnum millumbilum sæð ein kurteisligan italiumann í havnargøtum. At hann kallaðist Gianfranco Contri, fekk eg at vita, tá maðurin herfyri lat úr hondum eina føroysk /italska orðabók. Bókin telur góðar 600 síður, og tey umleið 15.000 føroysku orðini, sum Contri miðvíst gjøgnum nógv ár hevur týtt og skipað til italskt, er ein fongur á okkara lítlu orðabókahill. Eg kundi eisini sagt, at bókin er ein kærkomin gáva til føroysku tjóðina. Men so ógvuslig orð hveppir man seg við at brúka. Høvundin hevði so dánt latið verkið úr hondum, tá innlendismálaráðharrin Jógvan við Keldu bað hann pakka sítt kuffert, og fara av landinum.

Fríggjakvøldið 17. september, fekk Gianfranco Contri kortini tillutaða M.A. Jacobsens Bókmentavirðislønina. Og tað mundu vera fleiri enn eg, sum fegnaðust um ta avgerðina. Bæði tí ein orðabók altíð rúmkar um mentunarliga útsýnið, men eisini tí avgerðin hjá M.A. Jacobsens bókmentanevndini vísti, at Føroyar ikki bara er ein skammleys nassaratjóð. Vit billa okkum hálvavegna inn at hava ein nattúrugivnan rætt til at fáa Ríkisveiting úr Danmark, fiskikvotu frá íslendingum, og at feitar pengaslangur ganga úr grunnum Norðurlandaráðsins niður í ymiskar føroyskar verkætlanir, og at vit onki skulu lata afturímóti, uttan eitt býttisligt nassarasmíl.

So kann man spyrja, um Gianfranco Contri mundi vera biðin um at pakka kuffertið, tí hasin pompøsi figururin úr Klakksvík ikki evnar kynstrið at siga takk? Ella kundi orsøkin møguliga verið tann, at Jógvan við Keldu bara umsitur eitt danskt málsøki, og hann sostatt er noyddur at fylgja tí stranga danska útlendingapolitikkinum? Báðir møguleikarnir eru til staðar. Men sum frá er liðið, haldi eg, at man kann siga, at Jógvan við Keldu í veruleikanum er munandi altráari enn Bertel Haarder at halda sítt terretorii kliniskt reint fyri útlendskt árin. Og Keldumaðurin smíðar meðan jarnið er heitt. Eitt er so tað, at hann hevur Fólkaflokkin aftanfyri seg, og uttan iva stórar partar av hinum flokkunum, men maðurin hevur eisini sítt taktiska samband við Føroya Arbeiðarafelag. Á sjálvum altjóða arbeiðaradegnum, tá Internasjonali "denne slidte og bulede schlager fra firserne!" sum William Heinesen yrkti, varð sungin á øllum torgum runt um í heiminum, tá trein Ingiborg Vinter fram sum ein typiskur nasjonalur arbeiðaraleiðari, og sýtti at veita teilendingunum suðri á Sandi eina hjálpandi hond, hóast hesi fólkini vóru limir í hennara felag.

Í veruleikanum hevur innlendismálaráðharrin krøkt Føroyar uppí eitt umfatandi altjóða fremmandafíggindaligt rák. Kanska gevur tað pørtum av veljarafjøldini eina ávísa tryggleikakenslu, men eftir mínum tykki er talan um eina falska tryggleikakenslu. Hugsar man seg eitt lítið sindur um, so hava fremmandafólkini í veruleikanum verið ein fongur fyri landið. Nevnast kann ríka tónleikaraumhvørvið sum bornholmarin bakar Hansen skapti, og eg haldi, at man kann siga, at Kristian Blak er hansara reinkarnasjón. Í telefonbókini síggja vit útlendsku eftirnøvnini hjá eftirkomarunum av kolamonnunum suðri í Rangabotni, eisini teir vóru ein fongur fyri Tvøroyri. Ella taki gróðurin, sum framvegis grør undan restorffunum, bæði á tí vinnuliga og listarliga økinum. Sjálvt armingurin Ishøj, ella kverulanturin, sum onkur tók til, fekk Tummas Napolium Djurhuus at skriva eina av teimum fagrastu yrkingunum í okkara skaldskapi. Og eitt avtrat. Tað eru bara nøkur fá ár síðani, at kreppan rak okkurt um tíggju prosent av okkara fólki úr heimlandinum, og hvat skuldu tey fólkini gjørt, um ikki grannalondini tóku ímóti teimum? Generøsiteturin hjá grannunum forpliktar, og átti at fingið okkum at verið gestablíðari og stórtøknari.

Áðrenn Jógvan við Keldu vísti orðabókahøvundanum av landinum, so átti hann at havt í huga tørvin, sum føroyingar hava fyri einum víðum mentunarligum samskifti. Í dag er ikki nógmikið at vera rætttrúgvandi baptistur ella rætttrúgvandi sosialistur. Og líður ein politikkari eisini av xenofobi, so er tað ikki í Landsstýrinum viðkomandi skal sita, men í samtalu hjá onkrum sálarfrøðingi við serkunnleika í mentunarsøgu. Ein slíkur kundi fortalt tí xenofobiska politikkarum frá, at Italia hevur potensialini at gerast tann leiðandi kraftin í Europa. Á øllum økjum skarðar hálvoyggin burturúr. Eisini tá talan er um katastrofur. Nógv av teimum elstu og bæriligastu bygningsverkunum í Europa standa í Italia. Og tak bókmentirnar, málningalistina, tónleikin, ja, tónleikurin, Jógvan við Keldu. Elegansan kemur úr Italia, og ber elegansa ikki uppá rím við renesansa?



*Nógv av teimum elstu og bæriligastu bygningsverkunum í Europa standa í Italia. Og tak bókmentirnar, málningalistina, tónleikiin. Elegansan kemur úr Italia, og ber elegansa ikki uppá rím við renesansa skrivar Jóanes Nielsen, rithøvundi*

Um fimtan, kanska tjúgu ár, verður Rom tann nýggi europeiski miðdepulin. Tað sjónarmiðið royndi Thomas Bernhard at føra fram í einari av sínum ógvusligu og hatsku skaldsøgum, har protestantisman og nazistiska fortíðin hjá Eysturríki, vóru løgd undir hansara viðbreknu sjóneyku. Men líka mikið um Bernhard hevur rætt ella bara partvís rætt, so hava italsk sambond longu nú ein grundleggjandi týdning í okkara parti av verðini. Tað kann vera ymiskt, hvussu man definerar eina vøru, og eisini hvør munurin er á eini tænastu øðrumegin, og á eini vøru hinumegin. Men líkamikið hvør definisjónin er, so er Italia ein sól sum tær meiri heimleysu ferðandi stjørnurnar royna at súgva varma burturúr. Málið hjá Dante stendur í durinum, og kanska kemur tann tíðin, tá orðabókin hjá Cianfranco Contri ferð at vera eins nógv brúkt sum ensk/føroyska orðabókin. Og at reka ein sovorðnan mann av landinum, tað ger annaðhvørt ein býttlingur, ella ein vónleysur opportunistur.

Og hann versnar bara, Jógvan við Keldu. Hósdagin 23. september bar Útvarpið tíðindini um, at hann nú brúkar sín landsstýrismannamyndugleika at sýta løgtingsmonnum yvirhøvur at viðgera skásett paralag. Og í leygardags Sosialinum 2. oktober, skilir Tórbjørn Jacobsen væl hansara avgerð. Eg skilji eisini avgerðina hjá Keldumanninum, og somuleiðis ósmakliga spotti hjá Tórbirni, tá hann skrivar, at Tjóðveldisflokkurin nú er spentur fyri vognin hjá djeikarunum og teimum lesbisku í Føroyum. Øll skilja so óalmindiliga væl hvønn annan, og intellektuelt ber til at fata flestu trupulleikarnar og fyribrigdini, sum eru til á jørðini. Men tá kenslur eru í klemmu, fyri ikki at tosa um fordómar og stykni, tá er tað, at Fanin er leysur, og man fer í skápið eftir hondgranatunum, ella sum mæti søgufrøðingurin Virgar Dalsgaard sigur, man fer til Noregs at læra at skjóta.

Í uppískoytinum til tey tíggju boðini, finna vit eina ørgrynnu av undirreglum, og hvussu nógvar av hesum undirreglunum eru tengdar at sexualitetinum, veit eg ikki, men tær eru nógvar. Gomlu semittarnir kneptu kamelum, asnum, hestum, sínum egnu børnum, hjákonum, grannakonum, monnum, ungum sum gomlum, ja eisini flogfenaður var brúktur, og til at forða hesum villa lívi, so smíðjaðu prestarnir reglar, og tað vóru ikki hissini reglar, og guddómiligar hóttanir trutu heldur ikki. Gud legði býirnir Sodomma og Gomorra í oyði, tí ikki ein gang ein friðsal geit kundi spáka sær ein túr, uttan at vera drigin inn í eitt skýmaskot, ella aftur um eitt dadlutræ, og var skammriðin líka til roykur stóð út gjøgnum oyrini.

Fyri tveimum árum síðani upplivdu føroyingar, hvussu Gerhard Lognberg svínaði eitt viðkvæmt teaturstykki til, tí fýrurin ikki dámdi, at leikararnir brúktu orðið kusa á pallinum. Eg kann fortelja Gerhardi, at í flestu førum sita konur á sínum lalli. Tað gjørdi omma Gerhard, og eisini systir Fidel Castro. Hevði lallið haft okkurt annað navn, ella kanska verði plaserað í pannuni ella millum herðabløðini, so var støðan møguliga ein onnur. Men lallið er ein realitetur. Sexualiteturin í síni heild er eisini ein realitetur, og kann frígera hald í nakkanum, lekjalendasjúku, og fáa kvinnur so væl sum menn at vera glað, skapandi og hjálpsom. Og so leingi sum man ikki skaðar onnur við sínum sexualiteti, so eigur lógarverkið heldur ikki at leggja sexualitetinum nakrar forðingar. Og eitt lesbiskt par ger ongan skaða, heldur ikki tveir homosexuellir menn, og tað sama kann man siga um tey glaðu heterosexuellu. Um fólk eru sadistar og masochistar, heldur ikki tað eigur lógarmyndugleikin at leggja seg útí. Tí tað eru vaksin fólk sum íðka tað slagið av sex, og avgerðin er teirra egna. Men her er kanska uppá sítt pláss at viðmerkja, at tey, sum uppfunnu tær mest raffineraðu andstyggiligheitirnar, so sum at gjelda, brennimerkja, steina, bannlýsa og eyðmýkja, í flestu førum vóru trúfastar verjur av tí heilaga heterosexuella hjúnalagnum.

Jógvan við Keldu eigur ikki at blanda sítt persónliga stykni, við sína uppgávu sum landsstýrismaður fyri alla ta føroysku tjóðina. Tey samkyndu hava brúk fyri somu virðing og umsorgan, sum hvør einasta menniskja hevur brúk fyri. Landsstýrismaðurin eigur at minnast til, at tað var tann tíð, tá stovnarin av Brøðrasamkomuni hevði brúk fyri virðing og umsorgan, og hana fekk hann tíbetur frá kjerligum fólki í Havn. Kærleikin grør náttúrliga inn í demokratiið, ella kanska er tað demokratiið, sum grør inn í kærleikan, líka veit eg. Men tað rakar snøgt sagt ikki Jógvan við Keldu, á hvønn hátt fólk elska hvørt annað, ella um tey vilja ganga inn í skrásett paralag. Tey samkyntu eru ikki bara medmenniskju, skattaborgarar og grannar. Teirra sexuella kós, er eisini til staðar í huganum hjá øðrum. Flestu menniskju hava onkra løtu kent seg drignan at sínum egna kyni, og tá tað ikki hevur verið tilvitað, so hevur ein í svøvni droymt um tað. Soleiðis er menniskjan einaferð skipað, og at niðurgera ella kriminalisera hesar íbornu eginleikar, er líka so høpisleyst, sum tað er tápuligt.

Jógvan við Keldu kundi sjálvandi sent sínum Skapara eitt bræv, og spurt, hví hann skapti menniskjuna so samansetta og óútrokniliga. Kanska hevði Skaparin svarað, at hann gjørdi tað fyri at hava ein møguleika at eftirkanna styrkina í okkara næstakærleika.